Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Føroyskt vinnulív

Oddagrein

Føroyski búskapurin hevur seinasta tíggjuára skeiðið verið fyri stórum broytingum. Samfelagið fór úr djúpari kreppu til eina støðu nú, har tosað verður um ovurhiting av búskapinum, og útlendskur kapitalur byrjar at koma inn aftur í samfelagið. Hettar hava vit eitt nú sæð í alivinnuni. Ymiskt er hvussu vinnulívið hevur hilnast hettar tíðarskeiðið. Nógv feløg fóru á húsagang, tá kreppan leikaði harðast á, meðan onnur konsolideraðu seg og standa kanska sterkari eftir kreppuna.

Í áttatiárunum vóru fleiri útlendsk feløg virkin í Føroyum, millum annað í byggivinnuni. Tað er ivaleyst gott, at vinnan fær íblástur og kapping uttaneftir, men ansast má eftir, at eigaraviðurskiftini eru greið, soleiðis at tað er greitt hjá borgarum og myndugleikum, at talan er um føroysk feløg, um tey rópa seg tað. Spurningurin er so, hvussu eitt føroyskt felag verður definerað. Í alivinnuni er norskur kapitalur innkomin. Vinnumálastýrið hevur verið í tinginum við uppskoti um at loyva upp til 49% av útlendskum partapeningi. Skal hettar so skiljast sum, at um 51% av partapeninginum er føroyskur, so er talan um eitt føroyskt felag? Kann man fara so langt sum at siga, at bara tann dominarandi partaeigarin er føroyskur, so er talan um eitt føroyskt felag?

Ivasamt er, um tal av føroyskum parteigarum er eitt gott mát. Ein kann hugsa sær eina støðu við 1000 føroyskum partaeigarum, ið eiga eina krónu í part, meðan ein útlendskur partaeigari eigur eina milliónaupphædd. Spurningurin er, um eitt slíkt felag hevði kunnað verið flokkað sum føroyskt.

Íslendarar hava altíð ansað sera væl eftir, at íslendska fiskivinnan hevur verið hildin á íslendskum hondum. Føroyingar eiga at gera upp við seg sjálvan, hvat vit vilja, og hvussu vit tilrættisleggja føroyskt vinnulív. Tað er ivaleyst skilagott at skilja ímillum vinnur. Eitt nú fiskivinna er eitt tilfeingi, ið føroya fólk eigur, og tí eigur ivaleyst at vera farið sera varisliga fram viðvíkjandi útlendskum kapitali, meðan aðrar vinnur sosum eitt nú tænastuvinnur kundu kanska fingið gagn av útlendskum íløgum.

Diskussiónin um hvussu eitt føroyskt felag skal definerast er relvant fyri allar vinnur, og ikki minst nú ein oljuvinna stendur fyri durum. Tosað hevur verið í fiskivinnuni um útlendskar kreftir, ið keypa fiskiloyvir við føroyskum frontfigurum. Veitaravinnan og oljuvinnan verða vinnur, har útlendskur kapitalur er neyðugur, men greitt má vera fyri myndugleikum og borgarum, hvørji áhugamál standa aftanfyri. Vónandi fáa vit eitt mennandi kjak um hvussu føroysk feløg skulu definerast, so at ongar misskiljingar verða í føroyum og ikki minst uttanlands. Vónandi fer føroysk fiskivinna, vinna annars og oljuvinna at vera frí fyri sokallaðum strámannavirksemi, har roynt verður at vinna frammihjárættindi sum føroyingur uttan at føroysk áhugamál verða umboðaði.

Sosialurin

Viðmerking:

Einki gykl – fólkaatkvøða verður, táið tíðin er búgvin

Orðaskiftið um fólkaatkvøðuna hevur tikið eina løgna vend. Og fólk eru farin at ivast í, um nøkur fólkaatkvøða yvirhøvur verður um broyting í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark.

Sjálvandi verður fólkaatkvøða. Men hon hevur ongan skund. Tað er ikki alt avgerandi, hvussu skjótt tað gongur, tað sum er alt avgerandi er, hvussu væl fólkið er upplýst um, hvussu støðan verður í Føroyum við fullveldi og uttan fullveldi. Og tað hevur sjálvandi nógv við búskap at gera.

Fólkið skal hava at vita, hvat tað er man tekur støðu til. Fáa Føroyar fullveldi, sigur danska stjórnin, at skiftistíðin verður 4 ár, ja, kanska upp móti seks árum. Tað vil siga í hesum tíðarskeiði verður blokkstuðulin minkaður burtur. Men hvussu verður, um einki hendir viðvíkjandi føroyskum sjálvstýri?

Henda spurning hevur landsstýrið skyldu til at fáa svar uppá, og danska stjórnin skyldu til at svara uppá. Fremstu ráðgevarar hjá donsku stjórnini siga, at blokkurin skal minka kortini, og helst minka burtur, uttan mun til hvussu viðurskiftini verða millum londini bæði. Tí føroyski búskapurin er nóg sterkur til tess. Tað vil altso siga, at mest sannlíkt er, at uttan mun til, um vit fáa sjálvstýri ella ikki, so hvørvur danski blokkstuðulin til Føroya. Uttan fullveldi fáa vit kanska nøkur ár afturat, men vit vita tað ikki.

Hvussu verður so, um ein nýggj kreppa stingur seg upp í Føroyum. Eisini her hevur stjórnin sagt, klokkuklárt, at tað er eitt føroyskt problem, og ikki eitt danskt, sama hvussu viðurskiftini verða landanna millum.

Hetta eru tey mál, sum landsstýrið skal arbeiða víðari við, og fáa svar uppá, uttan mun til, hvat kemur burtur úr samráðingunum nú tann 15. juni. Vit skulu

sjálvandi røkka teimum endamálum, vit hava sett okkum, nevniliga at Føroyar gerast sjálvberandi og sjálvstøðugar. Nyrup hevur sett sær fyri, at so skal ikki vera. Tað vil siga vit standa í einari støðu sum krevur at mýkjast.

Fyri Sjálvstýrisflokkin er tað ikki avgerandi, at ein fólkaatkvøða skal vera um hetta júst nú, ella ongantíð. Tað sum um ræður er at tíðin er búgvin til fólkaatkvøðu, tá ið hon verður.

Øll minnast, at Sjálvstýrisflokkurin setti sum áfrávíkiligt krav, at fólkaatkvøða skuldi vera um eina nýggja skipan millum Føroyar og Danmark. Høvdu vit ikki kravt tað, so hevði Føroya fólk ikki fingið hesa trygd. Men hetta krav forpliktar okkum til at gera tað klokkuklárt og greitt fyri fólkinum, hvat man sigur ja til, og hvat man sigur nei til. Einki skal gyklast fyri fólki, hvørki viðvíkjandi fullveldi ella viðvíkjandi heimastýri.

Fáa vit ikki svar uppá henda spurning nú, so er tað sjálvandi uppgáva landsstýrisins at fara til verka, líka til vit hava fingið eitt greitt og nøktandi svar. Og hetta arbeiði má taka ta tíð sum krevst. Nú ræður um ikki at lata politiskar ósemjur í Føroyum forkoma møguleikanum at flyta sjálvsavgerðarrættin og ábyrgdina til Føroyar á ein sømiligan og ein rímiligan hátt fyri allar partar.

Helena Dam á Neystabø

Mótmæla at landsstýrið letur frá sær rættindi

Ein minniluti í uttanlandsnevndini (Jóannes Eidesgaard, Edmund Joensen og Marius Dam) hava hesar viðmerkingar til viðgerðina í uttanlandsnevndini í samband við komandi samráðingarnar millum landsstýrið og ríkisstjórnina 15. juni 2000:

Samb. grein 54 stk. 2 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya skal landsstýrið ráðfoka seg við uttanlandsnevnd løgtingsins í samband við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.

8. juni 2000 var fundur millum uttanlandsnevndina og umboð fyri landsstýrið við løgmanni á odda, har dagsskráin var komandi samráðingarnar millum landsstýrið og stjórnina 15. juni 2000. Løgmaður greiddi frá ymiskum í samband við komandi samráðingarnar, t.v.s. her var bert talan um eina partvísa kunning. Talan var ongantíð um ráðføring við nevndina, soleiðis sum stýrisskipanina fyriskrivar, og løgmaður ætlaði at hesin fundurin skuldi verða tann einasti og seinasti áðrenn samráðingarnar nú hósdagin. Formaðurin í nevndini hevði heldur ikki ætlan um fleiri fundir um hetta evnið, men eftir ynski frá minnilutanum var nýggjur fundur avtalaður.

Ein ráðføring við nevndina merkir, at nevndin tekur eina støðu til eitt skrivligt upplegg, sum landsstýrið kemur við. Niðurstøðan hjá nevndini má festast á blað og sendast landsstýrinum, soleiðis sum siður eisini hevur verið, serliga tá samráðingar vóru um markið millum Føroyar og Bretland.

Á fundinum 8. juni 2000 býtti landsstýrið nøkur notat út til nevndina viðvíkjandi ymiskum viðurskiftum, sum partarnir á seinasta samráðingarfundi vóru samdir um skuldi gerast. Men nevndarlimirnir høvdu ongan møguleika at kunna seg við hesi notat á sjálvum fundinum. Tí varð biðið um nýggjan fund, soleiðis at í minsta lagi partar av andstøðuumboðunum fingið møguleika at geva sína hugsan til kennar.

Í vikuskiftinum eftir fundin í uttanlandsnevndina er komið fram í fjølmiðlunum, at landsstýrið hevur slept ynskinum um javnbjóðis rættindir hvør hjá øðrum, eftir at Føroyar eru vorðnar eitt fullveldi. Hetta varð als ikki nevnt á fundinum í uttanlandsnevndini, og landsstýrið hevur ongantíð leitað sær ráð frá nevndini um henda spurning. Minnilutin kann bert staðfesta, at her er talan um mannagongd, sum als ikki er í tráð við okkara stýrisskipan. Tað er als eingin ráðføring farin fram í samband við komandi samráðingar, serliga tá tað nú kemur fyri dagin, at samráðingaruppleggið er munandi broytt.

Minnilutin mótmælir harðliga, at landsstýrið letur av hondum rættindir og møguleikar, sum føroyingar í dag eiga í ríkisfelagsskapinum.

Viðvíkajndi notatunum, sum eru býtt út til nevdnina, so kunnu vit bert staðfesta, at hvørki meirilutin í nevndini og enn minni landsstýrið ætlaði at viðmerkingar skuldu gerast til hetta tilfar. Tí vil minnilutin bert vísa til tað, sum er sagt í álitinum frá sama minniluta, tá fyrsta samráðingaruppleggið var til viðgerðar.

Sum ein heilt nýggj siðvenja hevur samgongumeirilutin saman við umboði Miðfloksins í uttanlandsnevndini gjørt av, at uttanlandsnevndin skal sita á Christiansborg, meðan samráðingarnar fara fram. Sambært notati, sum løgfrøðingur á løgtingsskrivstovuni hevur gjørt, so verður beinleiðis sagt, at uttanlandsnevndin sbr. lógini ikki hevur heimild at luttaka í millumtjóða samráðingum. Hetta er ein siðvenja, sum er púra ókend í londunum rundan um okkum. Í staðin fyri, at uttanlandsnevndin saman við landsstýrinum ger neyðuga heimaarbeiðið sambært stýrisskipanarlógini, verður meirilutin saman við umboði Miðfloksins meira ella minni partur av samráðingunum, tí landsstýrið skal ikki bert kunnað nevndina leypandi, men eisini ráðføra seg við hana. Hetta vil sjálvsagt eisini ábyrgda luttakararnar úr uttanlandsnevndini fyri tí úrsliti, sum kemur burtur úr samráðingunum.

Tórshavn 13. juni 2000
Jóannes Eidesgaard
Edmund Joensen
Marius Dam

Nokta at kunna um hernaðarmál

Landsstýrið krevur, at danska stjórnin kunnar um hernaðarliga leiklutin hjá Føroyum, men hesum sýtir stjórnin fyri. Landsstýrið fer at taka málið upp á samráðingarfundinum í dag, hóast danir hava noktað at taka tað við í fundarskránna

Eyðun Klakstein og John Johannessen úr Keypmannahavn

Landsstýrið vildi hava hernaðarmálið við í dagsskránna fyri samráðingarfundin í Keypmannahavn í dag, men hesum sýtti danska stjórnin blankt fyri.

Tí er hernaðarmálið ikki ein sjálvstøðugur partur av samráðingunum í dag, soleiðis sum landsstýrið ætlaði. Men landsstýrið fer ikki at finna seg í, at danir ikki hava hug at tosa um hetta mál.

– Vit vóru noyddir at góðtaka, at tann kunningin, sum vit vilja hava um verjumál, ikki kemur við í dagsskránna fyri fundin hesaferð, men vit ætla at taka málið upp á fundinum kortini, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

– Um vit ikki høvdu verið samd um eina fundarskrá, hevði ikki borið til at havt nakran fund, og tí sleptu vit kravinum um at fáa hernaðarmál við sum ein sjálvstøðugan part av samráðingunum hesaferð.

Landsstýrið krevur at fáa upplýsingar um hernaðarliga leiklutin hjá Føroyum fyrr og nú, men hesum sýtir danska stjórnin fyri

Stjórnin strikaði hernaðarmál

Brævaskiftið, sum hevur verið millum Anfinn Kallsberg og Poul Nyrup Rasmussen undan samráðingunum í dag, vísir, at partarnir eru ósamdir um, hvussu farast skal fram í hernaðarmálum.

Danska stjórnin vil hava eitt ítøkiligt uppskot frá landsstýrinum, áðrenn tað fer at viðgera hernaðarmál, men landsstýrið sigur seg ikki verða fört fyri at gera nakað upplegg, fyrr enn danska stjórnin hevur kunnað landsstýrið um leiklutin hjá Føroyum í hernaðarligum viðurskiftum.

Síðsta dagin í mai sendi løgmaður danska forsætisráðharranum eitt uppskot um, hvussu landsstýrið vil hava fundarskránna at síggja út. Í hesum uppskoti skal danska stjórnin kunna landsstýrið um hernaðarmál, sum hava við Føroyar at gera.

Men tá Poul Nyrup Rasmussen eina viku seinni svarar brævinum frá løgmanni, verða hernaðarmál strikað av dagsskránni.

– Danska stjórnin hevur einki at leggja afturat tí notati, sum Verjumálaráðið hevur gjørt um hernaðarstøðirnar í Føroyum. Hetta notat hevur landsstýrið fingið, og eru faktuellir spurningar til hetta notat, er stjórnin sinnað at svara hesum spurningum, skrivar Poul Nyrup Rasmussen í brævinum.

Í notatinum, sum danski forsætisráðharrin nevnir, standa bara faktuellir upplýsingar um hernaðarstøðirnar í Føroyum, og einki nýtt er at finna í hesum notati.

Fáa einki gjørt uttan kunning

Fríggjadagin sendi løgmaður nýtt bræv til Poul Nyrup Rasmussen, har hann sigur, at landsstýrið ikki skilir, at stjórnin ikki vil kunna landsstýrið um hernaðarmál.

– Landsstýrið hevur fingið notatið frá Verjumálaráðnum, og umframt at danska stjórnin kann svara spurningum um hetta notat, eigur stjórnin eisini at koma við eini kunning av strategiska týdninginum hjá Føroyum, heldur Anfinn Kallsberg.

Landsstýrið ynskir tí at fáa hetta mál sum ein sjálvstøðugan part av samráðingunum, og landsstýrið vil hava donsku stjórnina at greiða bæði frá teimum søguligu viðurskiftunum og framtíðarstøðuni.

Týsdagin var aftur brævaskifti millum løgmann og forsætisráðharran. Poul Nyrup Rasmussen vísti føroyska kravinum um at verða kunnað um hernaðarmál frá sær. Hann sigur, at samráðingarnar byggja á, at føroyingar skulu gera upplegg og so verður tosað út frá tí. Skal hernaðarmálið viðgerast, mugu føroyingar koma við einum ítøkilium uppleggi til hetta.

Anfinn Kallsberg svarar danska forstætisráðharranum, at føroyingar kunnu ikki koma við nøkrum uppleggi um verjupolitikk í framtíðini, tí føroyingar kenna einki til týdningin hjá Føroyum í hesum samanhangi. Landsstýrið veit ikki hvønn leiklut Føroyar hava í hernaðarligum samanhangi, men landsstýrið heldur, at nógv bendir á, at hesin leiklutir ikki hevur verið lítil.

– Landsstýrið heldur seg eisini seinastu mánaðirnar hava fingið innlit í, at Danmark hevur fingið fíggjarligan ágóða av, at Danmark hevur nýtt føroyskt og grønlendskt landaøki í hernaðarligum viðurskiftum, skrivar løgmaður í brævinum til forsætisráðharran.

Kunning seinni

Landsstýrið endar tó brævið við at siga, at tað má taka til eftirtektar, at danska stjórnin ikki ynskir at hava hernaðarmál við í fundarskránni.

– Vit ætla at taka málið upp á fundinum, og danska stjórnin hevur lovað at koma við eini kunning seinni, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

– Vit hava ongan møguleika at gera nakað upplegg um verjupolitikk í framtíðini, um vit ikki kenna søgguna og tann leiklut, sum Føroyar hava havt og hava í hesum samanhangi.

Landsstýrið hevur nevnt, at tað umhugsar at søkja um limaskap í felagsskapinum Partnership for Peace, sum er ein felagsskapur við tilknýti til NATO. Men nakran neyvan verjupolitikk ella upplegg um hetta, sigur landsstýrið seg ikki vera fört fyri at gera, uttan at tað fær ein kunning frá donsku stjórnini.

Poul Nyrup Rasmussen noktar fyri at viðgera hernaðarliga støðuna hjá Føroyum, um landsstýrið ikki kemur við einum ítøkiligum uppleggi um verjupolitikk

Anfinn Kallsberg sigur, at landsstýrið er ikki fört fyri at gera nakran verjupolitikk, fyrr enn danska stjórnin hevur kunnað føroyingar um hernaðarligu viðurskifti

Av tí, at skeiv lýsing hjá Smyril Line er komin í blaðið mikudagin endurprenta vit tí røttu lýsingina í dag. Sí niðanfyristandandi lýsing

Pakkaferðir summarið 2000 www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

Danmark
DanCenter summarhús
1 vika í summarhúsi
Danland íbúðir
1 vika í frítíðaríbúð
kr 10.999,-
kr 11.882,-

Noreg
Pers Hotel í Gol
1 vika í summarhúsi
kr 8.905,-

Hetland
Easter-houll Chalets
1 vika í summarhúsi
kr 7.962,-

Europa
Bilferja í Norðursjónum
Weissenhäuser Strand í Norður-Týsklandi
1 vika á frítíðardepli
kr 13.335,-

Ísland
Pakkaferð
Key Hotellini
við 7 daga innivist á hotelli í dupultkamari
kr 4.033,- fyri hvonn

Stál & Flúgv
Sigt verður annan vegin og flogið hinvegin
Tórshavn - Hanstholm
og Keypmannahavn - Vágar ella hinvegin
kr 2.445,- fyri hvonn

• • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • •

e-mail: booking@smyril-line.fo